**Persónsupplýsingarpolitikkur fyri starvsumsøknir**

Tá tú søkir starv hjá Norðoya Sparikassa, viðgera vit tínar persónsupplýsingar í samsvari við dátuverndarlógina. Vit vilja tryggja, at tínar upplýsingar verða viðgjørdar trúnaðarliga og trygt.

**Hvørjar upplýsingar viðgera vit?** Vit viðgera hesar bólkar av persónsupplýsingum:

- Navn, bústaður, telefonnummar og teldupostadressu
- Føðingardag
- Útbúgvingar- og starvsroyndir
- Møguligar referansur og viðmæli
- Aðrar upplýsingar, tú velur at deila í tíni umsókn og CV

**Endamál við viðgerðini** Tínar persónsupplýsingar verða viðgjørdar við tí endamáli at meta um tína umsókn og førleikar í mun til tað starv, tú hevur søkt.

**Lógargrundarlag** Viðgerðin av tínum persónsupplýsingum fer fram við grundarlagi í tínum samtykki, sum tú gevur við at senda tína umsókn.

**Goymsla og strikan**

- Umsóknir frá umsøkjarum, ið ikki fáa starv, verða strikaðar í seinasta lagi 6 mánaðir eftir lokna starvssetanarviðgerð.
- Umsóknir frá umsøkjarum, ið verða settir, verða goymdar í starvsfólkamappuni.

**Atgongd til upplýsingar** Bert viðkomandi starvsfólk hjá Norðoya Sparikassa hava atgongd til tínar umsóknir og persónsupplýsingar. Vanliga eru tað starvsfólkaleiðarin, stjórin og viðkomandi deildarleiðari sum viðgera umsóknirnar. Eftir umstøðunum kann verða neyðugt at einstøk onnur starvsfólk eru við í viðgerðini av umsókníni.

**Tínar rættindi** Tú hevur rætt til at:

- Fáa innlit í tær upplýsingar, vit hava skrásett um teg
- Fáa skeivar upplýsingar rættaðar
- Fáa tínar upplýsingar strikaðar
- Klaga til Dátueftirlitið, um tú ert ónøgdur við okkara viðgerð av tínum persónsupplýsingum

**Revsiváttan** Øll, sum verða sett í starv í Norðoya Sparikassa, skulu eftir umbøn kunna vísa fram dagførda reina revsiváttan.

**Persónsprofilar (test)** Vanliga nýtir sparikassin persónleikaroyndir, sum part av setanartilgongdini. Hetta er treytað av serstøkum samtykki, sum skal latast áðrenn møguligt er at svara royndina. Endamálið við royndini er at lýsa persónligar eginleikar, sum eru viðkomandi fyri starvið. Royndin verður ikki einsamøll grundarlag undir vali av hvør umsøkjari verður settur, men er ein av fleiri pørtum í heildarmyndini. Sparikassin nýtir talgilda skipan frá eksternum veitara til persónsprofilarnar.

**Samband** Sparikassin ynskir, at umsóknir, sum sendar verða sparikassanum, verða sendar til

Norðoya Sparikassa
Ósávegur 1
Postboks 149
710 Klaksvík
Merkt: Umsókn um starv

ella við telduposti til starv@ns.fo. Um tú hevur spurningar til okkara viðgerð av tínum persónsupplýsingum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við starvsfólkadeildina á tel. 295055 ella starv@ns.fo.